SORINSKRIVARIN Í FØROYUM

DÓMARASKRIVSTOVAN

## Avloysari fyri skrivstovufólk søkist

Eitt áhugavert starv sum avloysari fyri skrivstovufólk í farloyvi er leyst at søkja á Dómaraskrivstovuni frá 1. august 2007 ella skjótast gjørligt. Starvið er fulltíðarstarv í 10 mánaðir.

**Høvuðsuppgávur:**
- Vanligt skrivstovuarbeiði
- Skráseting á teldu
- Telefonavgreiðsla

**Førleikakrøv**
- Skrivstovuútbúgving, HH, student ella liknandi
- Góð evni at samskifta á føroyskum og donskum máli
- Telduførleiki á brúkarastøði
- Góð samstarvsevni

**Setanar- og lønartreytir**
Setanar- og lønartreytir eru sambært felagssáttmála millum statsansattes kartel og Finansministeriet og sáttmála millum HK/Stat og Finansministeriet.

Setanarøkið fevnir um allar deildir á Dómaraskrivstovuni, tó kemur tann, ið settur verður, mest at arbeiða í sivilrættinum.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar, kanst tú ringja til Kathrinu Magnussen, skrivstovuleiðara, á telefon 31 10 03.

**Umsóknir**
Umsóknir, prógv og møgulig viðmæli skulu sendast til

***Dómaraskrivstovuna***
*Postboks 28*
*FO-110 Tórshavn*

ella sum teldupostur til post@sorinskrivarin.fo

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 6. juli 2007 kl. 12.00.

**SORINSKRIVARIN Í FØROYUM**
tann 29. juni 2007

Hoyvíkar Skúli

## STØRV Í HOYVÍKAR SKÚLA

**Søkt verður eftir tveimum lærarum og einum námsfrøðingi.**

**Lærarastørvini:**
Annað starvið er fulla tíð og hitt er umleið 18 tímar. Endaliga tímatalið verður avgjørt í september. Bæði størvini eru tíðaravmarkað fyri lærarar við lækkaðum tímatali og vegna serligan tørv.

**Lærugreinar og flokkar:**
1. flokkur: føroyskt, heimstaðarlæra, handaverk og list.
5. flokkur: kristni og føroyskt.
6. flokkur: enskt.
7. flokkur: kristni og rokning.
Nakrir stuðulstímar.
Umsøkjarar eiga at hava læraraútbúgving. Størvini eru lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

**Stuðulsstarvið:**
Vit søkja eftir námsfrøðingi at stuðla næmingi í 3. flokki. Starvið er 27 tímar. Løn sambært sáttmála við Føroya Pedagogfelag.

Umsóknir við prógvum og møguligum viðmælum skulu vera skúlanum í hendi seinast mánadagin 16. juli.

Meira fæst at vita við at venda sær til skúlastjóran, Birgit Arge á telefon 227603.

**Hoyvíkar Skúli**
Vegurin Langi
Postsmoga 3073
110 Tórshavn

Í Hoyvíkar Skúla verða komandi skúlaár umleið 500 næmingar í 22 flokkum frá 1.-7. flokk. Her fara at starvast 39 lærarar og 3 stuðlar.




## Kunngerð

Sambært gr. 6 í løgtingslóg nr. 13 frá 21.mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir við seinni broytingum verður við hesum gjørt kunnugt, at Tórshavnar býráð á fundi 22. juni 2007 hevur samtykt at gera nýggja serstaka byggisamtyktini fyri Stórutjørn og reguleringar fyri sama øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Endamálið við serstøku byggisamtykt er at skipa bústaðar-, vinnu-, stovnsbygging og bygging til mentanar-, frítíðar og ítróttarendamál á økinum Stóratjørn.

Serstaka byggisamtyktin fevnir um partar av ognunum matr. nr. 139a, 135ed, 135a og 1 æf, Hoyvík.

Almenna byggisamtyktin fyri Tórshavnar kommunu er broytt soleiðis, at D2 øki er víðkað eystureftir, og ein partur av verandi D2 økinum er broytt til A3 øki.

Tilfar, sum lýsir serstaku byggisamtyktina og broytingar í almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu, liggur frammi í Snarskivuni á Vaglinum, frá 2. til og við 23. juli 2007, frá mánadegi til fríggjadag frá kl. 9.00 til kl. 16.00, hósdag tó til kl. 18.00. Tilfarið liggur eisini á heimasíðuni www.torshavn.fo

Møgulig mótmæli ella broytingaruppskot verða at senda Tórshavnar kommunu skrivliga í seinasta lagi 2. oktober 2007.

**Tórshavnar kommuna**

Sosialurin
www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo



## TIL SØLU

Toyota Hiace árg. 1996. Km 216.000

**Tlf. 222326**



## TIL SØLU

Volvo V70 2,4 diesel 167 Hk.

Mod. 2004 Km 135.000

Við nógvari eykaútgerð. Sær út sum nýggur innan og uttan. Er í sera góðum standi.

**Tlf. 222326**